Pappírleysa skrivstovu

Hetta ljó›ar sum ein dreymaver›, men er í dag møguligt. Fleiri og fleiri virkir uttanlands arbei›a í dag vi› at fáa alt pappír burtur av skrivarabor›inum.

Í dag finnst ongin undanførsla. Allur útbúna›ur er tøkur til at gera skrivstovuna pappírleysa. Í seinastu viku hev›i Formula.fo serligt tiltak, har fólk úr Danmark greiddu áhuga›um keyparum frá, hvussu farast skal fram, um virkir og stovnar vilja av vi› øll pappír á arbei›splássinum.

Mátin, hetta ver›ur gjørt uppá er, at so hvørt posturin, sum kemur vi› vanliga postbo›num (á teldumáli kalla snail-mail) kemur inn á skrivstovuna, ver›a øll brøv ljóslisin (skanna›) inn á eina skipan, i› kallast Orbit. Tá tey eru ljóslisin inn í Orbit, kunnu pappírbrøvini gott koyrast ígjøgnum makrolatorin ella í pappírspannina. Vi› Orbit hevur tú møguleikan at senda innkomna postin ví›ari — nú er hann bert í telduni í sta›in fyri sum pappír.

Hvat vi› pappírinum, kanst tú spyrja. Ja, her skal helst ein hugbur›sbroyting til fyri at kunna taka avger› um bert at koyra vi› elektroniskum dokumentum. Men hugsa vit um ta›, so fer ein stórur partur av øllum samskifti í dag um teldupost, sum er elektroniskur, so avger›in átti ikki veri› so torfør.

Hvat skal til?
Hvat skal til fyri at fáa eina pappírleysa skrivstovu? Svari› er ikki so einfalt, tí ta› velst um virki›/stovnin og hvat man ætlar at byrja vi›. Men í høvu›sheitum kunnu vit siga, at ta› krevst ein ljóslesari (skannari), ein skipan, sum til dømis Orbit, har øll innlisin skjøl kunnu skipast í og til seinast er ta› tann endaliga skipanin, i› skjali› skal goymast í.

Ljóslesarin
Í dag ber til at ljóslesa (skanna) vi› fleiri ymiskum tólum. Vit kunnu nevna, at ein kopimaskina kann útbyggjast til ljóslesara, faksmaskinan og so ljóslesarar, sum serliga eru gjørdir til endamáli›. Á frams‡ningin hjá Formula.fo vístu teir ein Rank-Xerox ljóslesara, sum klárar at ljóslesa um 60 sí›ur í eitt minutt.

Orbit
Orbit er ein skipan til ljóslesing, skráseting og ra›festing (indeksering). Umframt at standa fyri sjálvari ljóslesingini, kann Orbit eisini tillagast til eitt slag av datagrunni, har skjøl og til dømis postur kunnu skipast og goymast í. Í Føroyum hevur tekniska deild á Landssjúkrahúsinum fingi› sær hesa skipan til at halda skil á tólum og tekningum av ymiskum slag. Onnur dømi um hvat Orbit ver›ur brúkt til eru produktionsstyring, og úti á Formula.fo eru teir í fer› vi› at leggja vitunardatagrunnin hjá teknisku deild inn á Orbit.

A›rar skipanir
Um vit til dømis hugsa um eina bókhaldsskipan sum til dømis Navision ella Concorde, so er møguleiki at ljóslesa øll bókingarskjøl inn í bókhaldskipanina og har bóka skjølini, fyri sí›an at leggja ta› elektroniska skjali› inn á sjálva bókingina. Tá ein seinni til dømis hyggur at einari ávísari bóking, kann man taka ta› elektroniska skjali› fram á skermin í sta›in fyri at leita upp og ni›ur í ymiskum brævordnarum. Á størri virkjum er tørvur á at ábyrgdarpersónur váttar bókingarskjali› á›renn ta› ver›ur bóka›. Hetta er als ongin trupulleiki hjá Orbit at taka sær av.

EDI
Hetta vi› elektroniskum dokumentum ver›ur vanliga stytt EDI (Electronic Document Interchange). Í framtí›ini ver›ur ta› alt meira vanligt vi› elektroniskum dokumentum, so sum ordrar og fakturar. Her eru nógvir pengar at spara, ikki minst í almennu umsitingini. Hugsa vit um hvussu nógv pappír skal avgrei›ast tá vørur ver›a innfluttar ella útfluttar, so er ta› undrunarvert at ta› almenna ikki gongur fremst. Ta› vísir seg ofta at ta› er har fløskuhálsurin er.

Nú er so enn ein møguleiki at byrja vi› og ta› er Orbit, sum er ein donskframleidd skipan og sum nú kann keypast frá Formula.fo.

Her síggjast Benny Severinsen frá Xerox, Lasse Carlsen, KT-teknikkari hjá Formula.fo, Claus Christoffersen frá EDG, sum ger Orbit og Kim Ejdesgaard, sølustjóri hjá Formula.fo, saman vi› einari kopimaskinu sum eisini kann brúkast sum ljóslesari

Spurnakassin

PANEL

Hava tit ein spurning um telduútbúna (HW) ella ritbúna (SW), hvat tit hava rætt og loyvi til ella okkurt heilt anna›, kunnu tit senda tykkara spurning til spurnarkassan.

Í panelinum at svara spurningum hava vit serkøn fólk at heita á.

Sendi› spurningin til: sid@sosialurin.fo

Spurningur:

Hvussu sleppi eg undan Cookies?

Eg vil ikki hava at onnur kunnu fylgja vi›, hvar eg havi veri› og hvat eg havi gjørt á alnetinum. Hvussu kann eg nokta teimum ymisku heimasí›unum at leggja cookies á mína teldu?

John vi› telduposti

Svar:
Tú vísir til "cookies" — sum eru lítlar tekstfílur, i› ver›a lagdar á tín har›disk, tá tú vitjar ávísar heimasí›ur. Sambært or›abókini merkir or›i› cooky millum anna› fitt genta ella drongur, og vísir helst til ta› óseka í hesum fyribrigdi, men ta› er úlvur í sey›askinni. Vanliga innihaldi› í einum "cookies" eru uppl‡singar sum gera at heimasí›an kann kenna teg, tá tú vitjar aftur. Nakrir alnethandlar brúka eisini "cookies" til at halda skil á tínari innkeypskurv. Hetta er ein hjálp í summum førum og ger ta› skjótari at leita runt á alnetinum. Um tú hyggur í mappuna "Windows\Cookies", sær tú eina rúgvu av smáum tekstfílum, sum byrja vi› tínum navni, einum "@" og so einari stytting av heimasí›unavninum, sum tú hevur vitja›. Um tú roynir at lesa eina tílíka fílu fær tú sjáldan høvd ella hala á tí har stendur. Vanliga eru ta› kotir, sum bert tann ávísa heimasí›an kann lesa og fáa naka› skilagott burturúr. Men ein møguleiki er at onnur kunna fylgja vi›, hvar á alnetinum tú hevur veri›. Til alla lukku eru møguleikar fyri at avmarka ella at nokta fyri hesum í til dømis Microsoft Internet Explorer útgáva 5.0, sum hevur eina skipan vi› "Internet sikkerhed-zoner". Tú kann byrja vi› at sletta alt sum stendur í mappuni "Windows\Cookies". Harafturat kann tú nokta fyri at cookies ver›a lagdar inn á tína teldu frá øllum – ella ávísum – heimasí›um. Ta› kann tú gera inni á "Funktioner/Internetindstillinger....", har kann tú velja "Sikkerhed" og sí›an "Brugerdefineret niveau...". Har eru tveir møguleikar at nokta fyri "cookies".

Tann eini møguleikin er at loyva cookies me›an tú er á heimasí›uni, uttan at tær ver›a goymdar á telduni, me›an hin møguleikin er bart út at nokta fyri "cookies" yvirhøvur, ella at spurt ver›ur um hetta á›renn tær ver›a lagdar á tína teldu. Har eru eisini a›rir møguleikar, sum tildømis um tú hevur fult álit á einari heimasí›u, so kann tú geva júst henni loyvi at leggja cookies á tína teldu. Tá skal tú velja "Web-steder du har tillid til" og loyva "cookies".

Nógv ver›ur í hesum døgum tosa› um trygdina í Windows 98, og Bill Gates stendur aftur fyri skotum. Ta› vísir seg at ver›a sera lætt at bróta inn (hacka) í Windows 98, me›an tú er á alnetinum. Kendi sjónvarpsma›urin hjá DR, Thomas Jersild, sum hevur sendingina Rapporten, vi›ger hetta evni í einari komandi sending, har hann tosar vi› fólk sum hava veri› fyri innbroti og eru beinlei›is hótt.



Til seinast kann nevnast at ta› finnast fleiri forrit, sum sjálvvirkandi syrgja fyri at sletta "cookies", sum eru løgd inn á tína teldu. Tú kann royna at leita inni á olivant.tucows.com. Har eru nøkur "shareware" forrit sum kosta úr 15 uppí 30 US$.

sid@sosialurin.fo

N‡ggj grind á alnetinum:

in.fo

Í ummæli fyrr í ár, tá heimasí›an Olivant hjá Føroya Tele var umrødd, var› greitt frá at slíkar sí›ur, umframt at hava dagførdar uppl‡singar, eisini virka sum sni›gøtur til heimsneti› (world wide webb). Nú er so n‡ggj sni›gøta komin, og umframt at hava sló›ir til víttfevnandi tilfar, er talan um tí›indi, fótbólt, sjónvarpsskráir og anna›.



Hetta er mynd av n‡ggju grindini, i› nevnist in.fo.

Á heimasí›uni hjá VIT stendur millum anna› at lesa:

4.mai var› n‡ggja grindin á alnetinum, in.fo, tikin í n‡tslu. Á in.fo eru tí›indi, fótbóltshagtøl, sjónvarpsskráin, ve›ri› og møguleiki er at senda SMS-bo›.

Kappingin um føroysku brúkararnar á alnetinum har›nar í hvørjum, og í dag læt so ein n‡ggj grind - ella portalur, sum ta› eisini ver›ur nevnt - upp.

Talan er um heimasí›una in.fo (http://www.in.fo), sum hevur fari› í kapping vi› eitt nú Leitel og Olivant. Ta› er VIT sp/f, sum hevur gjørt in.fo, sum ætlandi ver›ur grindin hjá telefelagnum Alnót.

Hugsanin vi› eini grind er, at hon er portri› til alneti›. Á in.fo ver›ur tú kunna›ur um mest sum alt, sum fyriferst í Føroyum og í útheiminum. Høvu›stænasturnar á in.fo í løtuni eru tí›indi og heimasí›ur.

Sostatt er talan um eina beinlei›is avbjó›ing móti Føroya Tele, sum vi› broytingini av heimasí›uni (á 4 ára fø›ingardegi Olivants), hevur lagt seg eftir at lofta føroysku brúkarunum á veg inn á Alneti›.

Sum teimum flestu kunnugt, eru ta› fólkini aftanfyri VIT, i› eisini hava tiki› stig til telefonfelagi› Alnót Com, sum eftir ætlan fer at taka kappingina upp vi› Føroya Tele innan telefonsamskifti her á landi og uttanlands.

Um vit skilja tí›indaskrivi› rætt, merkir hetta, at hendan heimasí›an er eitt alternativ til Olivant.fo, og solei›is ver›ur longdi armurin hjá n‡ggja telefelaginum.

Tí›indi hava stóran leiklut
Um tí›indatænastuna hjá in.fo Ver›ur í tí›indaskrivi á heimasí›uni hjá VIT, greitt frá:

Á in.fo kanst tú lesa n‡ggjastu tí›indini úr Føroyum og úti úr heimi. Dentur ver›ur lagdur á at geva skjótar og grei›ar uppl‡singar um ta›, sum hendir bæ›i her heima og uttanfyri Føroyar. Tí›indini á in.fo ver›a dagførd alla tí›ina, solei›is at in.fo altí› eru fyrst vi› tí n‡ggjasta.

Sostatt enn ein avbjó›ing til bæ›i konventionellu og ravtøkniligu tí›indatænasturnar her á landi.

Eisini heimasí›ur
in.fo leggur stóran dent á at vera ein tænastumi›il, i› kann flyta brúkarin skjótt og lætt millum heimasí›urnar her á landi. Millum anna› ver›ur sagt:

Á in.fo eru flest allar føroyskar heimasí›ur, og heimasí›ur vi› tilkn‡ti til Føroyar skrásettar. Um tú hevur eina heimasí›u, sum tú vilt at onnur skulu finna skjótt og lætt, so er besti mátin at skráseta hana á in.fo. Hetta er bæ›i ókeypis fyri teg og tey, sum skulu brúka sí›una.

Ókeypis
Seinast í nevnda tí›indaskrivi stendur, at ta› er ókeypis at brúka in.fo, hetta tí in.fo er fíggja› av sponsorum.

Okkara metan
Í sambandi vi› at sí›an er byrja› í farnu viku, hildu vit at ta› var uppá sítt pláss, at vit her komu vi› eini umrø›u av heimasí›uni, og ongin umrø›a uttan ummæli, sum vit hava tiki› vi› seinast í greinini.

Vit hava roynt sí›una, og halda at hon roynist sera væl. Eitt, sum ger at hon er løtt at n‡ta, er hátturin hon er sett uppá. Eitt nú eru ta› ongin yvirdrivin *frames* á sí›uni, sum gera brúkaran ørkymla›an.

Eitt, sum tó altí› er eitt sindur ke›iligt vi› slíkum sí›um, eru teir nógvu reklamubannararnir, men teir mugu sjálvsagt vera vi›, og teir mugu eisini vera so sjónligir sum gjørligt, fyri at slík heimasí›a kann vera ókeypis.

Hetta kundi leitt okkum inn á eitt minni hugsunareksperiment um komandi telefonfelagi›, Alnót Com. Munnu hesir fara at gera ta› sama sum amerikonsku telefyritøkurnar, vi› ókeypis fartelefonum. Í USA er ta› nevniliga solei›is, at um tú vilt gó›taka at ver›a avbrotin umlei› annanhvønn minutt av einari reklamu, sleppur tú undan at rinda fyri talutí›ina.

Annars kann nevnast, at eins og Olivant hevur in.fo lagt seg eftir at gera kanningar. Í løtuni er ein kanning um hvussu nógv hava fingi› hina navnframu Loveletter-telduvirusina sendandi. Tá vit vóru inni og atkvøddu, høvdu umlei› 300 atkvøtt. Hetta er sjálvsagt langt frá líka nógv, sum tá Olivant hev›i kanning um fullveldi, men ta› er eisini naka› i› upptekur fólk nógv meira enn virusin.

Tí›indini tann dagin, vit royndu heimasí›una, vóru m.a. um n‡ggja stjóran á Eimskip, at ein svii hevur funni› upphavsmannin til nevnda telduvirus og enn ein stjóri, tann hjá Framtaksgrunninum. Hetta vísir, at talan er um tí›indi bæ›i innan- og uttanlands.

Eitt, sum telur upp eftir er, at leitarin er sera lættur at n‡ta, og heimasí›urnar eru b‡ttar upp í eitt sera hóskiligt evnisyvirlit.

Til seinast kann nevnast, at sni›i› ikki sørt minnir um eina internetavís, og hetta er kanska tilætla›.

Fótbólturin dumpa›i
Eitt, sum flestu føroyingar eru sera leiddir av, er at tá sunnudagsdystirnir í fyrstu deild eru av klokkan 17, má bí›ast í nærum tveir tímar, á›renn Útvarp Føroya kemur vi› úrslitunum. Her átti in.fo lagt seg eftir at komi› vi› tí›indunum beint eftir leiklok. Serliga tá hugsa› ver›ur um, at talan er um tí›indaflutning fyri sera krevjandi brúkarum – Alnet brúkarunum.

Tá klokkan sunnudagin, var farin av fimm, logga›u vit á heimasí›una hjá in.fo, fyri at vita, um teir megna›u at bera tí›indini á›renn ÚF, men so var ikki. Tá klokkan var 18.40, greiddi ÚF frá úrslitunum í fyrstu deild hjá monnum, me›an onki var komi› fram á heimasí›una hjá in.fo.

Betri enn SvF
Ein av høvu›sbannarunum hjá in.fo er sjónvarpsskráir. Her ber til at síggja skránna hjá SvF, bæ›i dagsins skrá og skráina fyri næstu vikuna. Harafturat eru ummæli av mest t‡›andi sendingunum. Um vit her samanbera vi› heimasí›una hjá SvF, so hevur ongin skrá veri› har í langa tí›, so her er naka› at heinta.

Ummæli av www.olivant.fo:

Tøknikkur:	****
Stílur/sni›:	*****
Hentleikar:	*****
Møguleikar:	*****
Lætt at n‡ta:	******
Skjótleiki:	*****
Samanlagt:	*****

Vi›merking til telduor›:

Vit hava frætt frá einum lesara, i› f‡list á, at vit ikki hava naka› veruligt føroyst or› fyri pakka›ar fílur. Hann mælir til, at vit nevna tær tøvdar fílur. Vit lata hetta standa opi›, og bera bo›ini ví›ari til lesaran.

Eitt anna› fremmant or›, i› er nógv frammi í hesum døgum er or›i› multimedia, sum ver›ur sagt, tá ein arbei›ir vi› myndum, ljó›i og teksti samstundis. Vit hava sett okkum í samband vi› Fró›skaparsetri›, og fingi› at vita, at hetta á føroyskum kann nevnast margmi›il, so hetta or›i› ver›ur sjálvsagt n‡tt í komandi K.T.-hornum.

Lesarar eru sjálvsagt vælkomnir at senda okkum uppskot ella vi›merkingar um n‡ggj or›. Send eitt teldubræv til:

kthornid@sosialurin.fo

REPROZ
GRAFISKAR LOYSNIR
Tel +298 31 95 40
Fax +298 31 75 41
Alt innan prentlutir
Mail: jakzac@post.olivant.fo

FØROYA TELE
FAROESE TELECOM
Tinghúsvegur 3 • Postrúm 27 • 110 Tórshavn
Tel. 30 30 30 • Fax 30 30 31
T-postur: ft@ft.fo
Heimasíða: www.tele.fo

ELEKTRON
...ein livandi leiklut í kunningarsamfelagnum

SpF Teldu Tænastan
Staravegur 5 • Tlf.: 317620 • Fax: 317699 • www.tt.fo
Vit hava stórt úrval av:
Teldum • EDV-tilhoyri
Printarum • Telefax
Scannarum • Forritum
Telduspølum • Fartelefonum
Skrivstovumøblum

SKEIÐTÆNASTA HANDILSSKÚLANS * STH
útbúgving, eftir- og víðariútbúgving á Føroya Handilsskúla
Marknagilsvegur 77
Postsmoga 177 • FO 110 Tórshavn
Tel. 31 88 13 • Fax 31 33 74
T-postur: fh-sth@post.olivant.fo
Heimasíða: http://sth.olivant.fo

WWW.VIT.FO Tlf: 31 99 14
SKEIÐ - NETUMSITING - HEIMASÍÐUR
JournalVIT - GóðskuVIT - KommunuVIT - IntraVIT

sam~teld